

*Elin Mortensen hevði fyrsta fyrilesturin á Baressu í sambandi við mentanarvikuna í SMS*

# Fyrrapartsfyrilestrar á Baresso

Í SMS skipa tey fyri eini fyrilestrarrøð í sambandi við mentanarvikuna, sum er í SMS í hesum døgum. Tríggi fyrilestrar eru, tann fyrsti var í morgun, har Elin Mortensen greiddi frá um minni úr einari farnari øld. (Tað frætta vit meira um í blaðnum í morgin). Elin hevur havt samrøður við pápa sín, Jóhann Mortensen, um ta gomlu bóndamentanina. Hósmorgunin verður tað Hans Andrias Sølvará, sum er cand.mag í søgu og heimspeki. Síðani august 2007 hevur hann skrivað Klaksvíkar søgu fyri Klaksvíkar Kommunu. Fríggjadagin hevur Steinbjørn B. Jacobsen hugleiðingar. Steinbjørn hevur verið í fremstu røð bæði sum rithøvundi og útgevari í eitt mannaminnið. Hann hevur nógvar søgur um, hvussu galið tað kann ganga, tá man fer í holt við slíkt virksemi í Føroyum. Hesir fyrilestrarnir eru allir kl 10.00. Sjálva mentanarnáttina, fríggjakvøldið 6. Juni fara ungir yrkjarar at lesa sínar egnu yrkingar upp í Rit og Rák. Hetta verður klokkan19. Yrkjararnir eru; Bjørk Olsen, Ditte M. Joensen, Andrias Høgenni, Regin Berg, Ludvík Breckmann og Sigga Maria Højgaard. Hesi bæði seinastu hava givið yrkingasavn út. Tað er Heðin Klein sum verður orðstýrari hetta kvøldið.




















